Poul Michelsen, stjóri á Fiskasøluni:

Fiskasølan er meir enn bert Fiskavirking

- Vit royna at selja Føroyar í útheiminum, og tá er Fiskavirking bert ein partur av viðskiftaskaranum, sum vit ikki kunnu hava nakra serstaka meining um, sigur Poul Michelsen



DAGNY JOENSEN

- Eg havi onga viðmerking til støðuna á Fiskavirking. Mín uppgáva er at arbeiða fyri Fiskasøluna, sum selur fyri onnur enn Fiskavirking, sigur Poul Michelsen í telefonini úr Danmark.

Vit royna at virka fyri at veita øllum viðskiftafólkum okkara eina góða tænastu. Fiskavirking er bert 40 pst. av søluni, og tí er einki gagnligt at kjakast um júst hesa fyrivøku, tá vit annars skulu røkja allar kundar okkara.

Vil tosa um tað seinni

- Verður tað til eitt orðaskifti, sum fær týdning, so vilja vit vera við í ti, sigur Poul Michelsen.

Stjórin sigur annars, at Fiskasølan ikki hevur peningtøkan at keypa Fiskavirking, um so skuldi verið, og tí hevði tað verið burturvið at útala seg um, hvørt hesir stovnar skulu leggjast saman.

-Hvussu skipanin verður eftir umleggingina, kunnu vit tosa umtil tá tíð, sigur Poul Michelsen.

Í gjár upplýsti Fiskasølan, at tveir nýggir stjórar vóru settir á Faroe Seafood Danmark A/S.

Eftirspurningur eftir øðrum fiskasløgum

Spurdur um hvussu saltfiskaframleiðslan í Kina, sum Fiskasølan í vár upplýsti um, sigur Poul Michelsen, at har er gongd í. Ein føroyingur, sum býr í Kanada hevur verið í Kina og lagt teimum lag á, og stórur eftirspurningur er á ymsum marknaðum eftir alaskaupsa og hake (heyki).

- Ein deild er stovnað í Keypmannahavn, sum arbeiðir við at útvega hesi fiskasløg, m.a. úr Kina, Chile og aðrastaðni. Hetta er saltfiskur, sum er tilvirkaður úr øðrum fiskasløgum enn tey, sum vit selja í Føroyum, sigur Poul Michelsen.

- Vit hava ikki uppfunnið hesar marknaðir, men vit noyðast at vera har, sum fiskur er, við tí avmarking, at tað ikki verður gjørt í kapping við okkara egnu, sigur Poul Michelsen.

Ágangurin móti grinda-drápi herðist í Bretlandi

Ein av mongu felagsskapunum, sum siggja sær vinning av at agitera móti grindadrápi, er felagsskapurin »Environmental Investigation Agency«, ella kanska betur kendur undir styttingini »EIA«.

Í einari áheitan um at endurnýggja limaskapin verður sagt frá, at tey eru 15 fólk í fulltíðarstarvi, hjálpt av einum heri av virknum sjálvbodnum.

Í skrivinum rósar hann sær av ymsum brøgdum, so sum at vera fyrstur at krevja altjóða bann móti handli við tilabeini, at venda sær móti londum, sum handla við nashyrningahorni og móti føroyska grindadrápinum. Eisini reypar hann sær av nýtsluni av duldum filmsupptøkum – ein framferðarháttur, onnur halda vera lítið mannsømiligan.

Fyri at savna inn sum mest av peningi, m.a. til at løna teimum fastløntu, hevur felagsskapurin sent út lutaseðlar. Á hesum lutaseðlum er prentað áheitan um at banna søknarónglinum og at steðga grindadrápi. Á baksíðuni eru settir upp 6 »veruleikar« um Føroyar og grindadráp, so eingin ivi skal vera um, hvat peningurin er ætlaður til.

Lutaseðlarnir verða sendir út í bindum við 10 seðlum. Á hvørjum bindi er ein perma. Á innaru síðu á permuni er ein áheitan á fólk um at keypa ella selja hesar lutaseðlar. Áheitanina hava vit umsett, so eingin ivi skal vera um muruna í teimum, sum standa aftan fyri hendan felagsskap, og soleiðis vinna sær til lívsins uppihald.

Gerið so væl at keypa ella selja lutaseðlar fyri at hjálpa hvalunum:

Ótíðarhóskandi, óneyðugt og barbariskt

Gerið so væl at keypa ella selja hesar lutaseðlar fyri at hjálpa hvalunum.

Ótíðarhóskandi, óneyðugt og barbariskt…

Føroyska grindadrápið er *tann* størsta beinleiðis hvalajagstranin í Verðini: Í 1994 drupu teir meira enn 1200 hvalir og springarar. Føroyingar liva flott við øllum fyrimunum, ið nútímans búskapur veitir – teimum nýtist ikki at drepa hval til matna ella fyri at varðveita mentanina.

EIA avdúkaði sum teir fyrstu henda ræðuliga sið í 1985 og er einasti felagsskapur, ið hevur forðað einum drápi uttan at nýta harðskap. EIA eygleiðarar hava sjálvir sæð heilar familjur við hesum klóku kríatúrum myrd: Í einum drápi, sum tók meira enn 11 timar frá tíðliga á morgin til myrkurs, upplivdu teir, hvussu 86 hvalir óneyðugt vórðu myrdir.

EIA arbeiðir fyri í stundini at banna tí ómenniskjansliga reiðskapinum í hesum drápum: 5 punds krókurin, nevndur søknarongul, sum verður trýstur í hvalirnar fyri at fáa tak á teimum og hála teir nærri landi. Vit standa fastir við at sannføra føroyingar um, at hesin slátur skal støðga í stundini og med alla.

EIA tørvar tín stuðul! Gerið so væl at keypa ella selja hesar lutaseðlar fyri at fáa til vega lívsneyðugu upphæddina til herferðina hjá EIA at støðga drápunum.

